## Týskari hjálpti iranum

Ein 63 ára gamal týskari hevur viðgingið, at hann seldi iransku myndugleikunum sekstan tons av grafitti, sum iranar skuldu brúka í rakettídnaðinum. Týskarin, sum var stjóri í einari ídnaðarfyritøku í Týsklandi tá, hevur greitt frá, at hann hitti ein iranskan mann í 2003, og at hesin keypti sekstan tons av grafitti, sum blivu send til Iran ígjøgnum Turkaland í 2005. Tann nú 63 ára gamli maðurin royndi leingi at nokta seg sekan, men játtaði, tá ákæruvaldið kundi prógva, at hann hevði fingið fýra ferðir tann vanliga prísin frá iransku myndugleikunum, og at pengarnir vóru farnir á eina loyniliga bankabók á Seyshellunum.



## Hjartasjúklingar í røð

Alt fleiri danir standa bíðirøð eftir at fáa viðgerð fyri ymsar hjartasjúkur. Nýggj tøl hjá danska Hjartafelagnum vísa, at 22.000 hjartasjúklingar bíða eftir at sleppa til kanningar í sjúkrahúsverkinum, og tað er heili 45 prosent fleiri enn í fjør. Peter Clemmensen, yvirlækni og formaður í Hjerteforeningen, sigur við TV2, at tann langa bíðirøðin kemst av, at sjúklingar drála alt ov leingi við at fara til kanningar og fáa eina skanning av hjartanum. Í sjúkrahúsverkinum verður sagt, at tey kunnu ikki arbeiða skjótari, enn gjørt verður, og at tørvur er á bæði starvsfólki og útgerð, skal bíðirøðin styttast.

# Arbeiðsloysi betrar ikki kappingarførið

**Hóast búskaparlæran vil vera við, at eitt ávíst arbeiðsloysi kann hjálpa vinnuni í einum landi, so metir Jan Otto Holm, búskaparfrøðingur ikki, at vaksandi arbeiðsloysið í Føroyum er nakar fyrimunur. – Londini kring okkum hava nógv størri arbeiðsloysi, og tí verður kappingarføri hjá okkum ikki betri, sigur hann**

ARBEIÐSLOYSI
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Nú eru tølini frá hagstovuni fyri arbeiðsloysi í marsmánaði komin, og tey vísa, at arbeiðsloysið í Føroyum er omanfyri trý prosent, sum í búskaparfrøðini verður nevnt at vera eitt náttúrligt arbeiðsloysi í einum landi, sum eru fólk, sum flyta seg ímillum størv og so framvegis, og hetta skal somuleiðis hjálpa at tryggja, at kappingarføri hjá einum landi verður verandi á einum náttúrligum støði. Á sama hátt, sum stórt arbeiðsloysi eisini kann gera kappingarføri hjá einum landi betri, tí so er minni kapping um arbeiðsmegina. Men hetta er sambært Jan Otto Holm, búskaparfrøðingi, ikki galdandi fyri Føroyar í løtuni.

– Londini kring okkum hava nógv størri arbeiðsloysi, og tí verður kappingarføri hjá okkum ikki betri enn, sigur hann.

Tí metir hann, at vaksandi arbeiðsloysið í Føroyum bara er ein vansi í løtuni.

– Arbeiðsloysi er í prinsippinum altíð ein vansi, tí so eru færri hendur, sum eru við til at halda samfelagnum uppi, greiðir Jan Otto Holm frá.

### Seinkar búskapinum

Somuleiðis greiðir Jan Otto Holm frá, at tá arbeiðsloysið hækkar, so brúka fólk minni pening og tað seinkar búskapinum.

– Nógva tosið um kreppu, saman við arbeiðsloysinum, hava havt við sær, at fólk nýta minni pening, og tað er ikki ein fyrimunur, staðfestir búskaparfrøðingurin.

### Lokalt arbeiðsloysi

Eisini metir Jan Otto Holm, at tað í veruleikanum er soleiðis, at arbeiðsloysið á 3,4 prosent ikki er galdandi fyri alt landið.

– Í Føroyum er tað soleiðis, at eitt virki kann gera stórt útslag í arbeiðsloysinum, og tí kann mann rokna við, at til dømis í Klaksvík og aðrastaðni, har virkir eru latin aftur, at har er størri arbeiðsloysi enn til dømis í Havn, har mann kann rokna við at arbeiðsloysið er niðanfyri trý prosent, metir hann.

### Nýta minni pening

Ein annar stórur vansi við arbeiðsloysi er, at fólk fara at nýta minni pening, og tað kann geva eitt stórt útslag í búskapinum hjá einum landið.

– Tá arbeiðsloysið hækkar, so er ein beinleiðis avleiðing, at fólk nýta minni pening, og tað tálmar búskapinum øgiliga nógv, sigur búskaparfrøðinguirn.

Eisini tey, sum hava arbeiði nýta minni pening og tey, sum eru arbeiðsleys hava minni pening.

### Nógv krepputos

Hinvegin heldur Jan Otto Holm, at tað er torført at vísa á, hvussu stóran mun arbeiðsloysið ger, tí tað hevur verið so øgiliga nógv tos um kreppu, sum eisini hevur við sær, at fólk nýta minni pening.

– Hevði tað ikki verið so øgiliga nógv tos um kreppu, og arbeiðsloysið var eini trý prosent, so rokni eg ikki við, at fólk høvdu nýtt so lítið av peningi, sum tey annars gera í løtuni, vísir hann á.

### Droppið tunlar

Jan Otto Holm heldur somuleiðis, at tað er sera týdningarmikið at hava almennar arbeiðsskapandi ætlanir í gongd, tá landið hevur so avmarkaði búskaparamboð.

– Tað er okkurt púra galið hjá Anfinni Kallsberg og hinum, sum tosa um tunlar, tí tað er rættiliga avmarkað, hvussu arbeiðsskapandi tað er. Hinvegin eru ymiskar aðrar ætlanir í gongd, sum kunnu virka arbeiðsskapandi. Til dømis umvælingar av almennum bygningum og so framvegis, sigur hann.



*Jan Otto Holm, búskaparfrøðingur, er sannførdur um at vaksandi arbeiðsloysið í Føroyum er ein trupulleiki, sum best kann loysast við arbeiðsskapandi tiltøkum*